**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 108/2023: Uppskot til løgtingslóg um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk**

Bjørt Samuelsen, Jóhannis Joensen og Johan Dahl hava vegna Formansskapin lagt málið fram tann 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 22. mars 2024 er tað beint § 25 nevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 17. apríl, 23. apríl og 1. mai 2024.

Undir viðgerðini er nevndin samd um meginpartin av uppskotinum, men hevur harumframt býtt seg í tríggjar minnilutar, tá ræður um sjálva lønarásetingina.

**Ein samd nevnd** hevur hesar viðmerkingar:

Verandi løn og eftirløn fyri tingfólk var ásett við løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Høvuðsbroytingarnar í tingmannalønum vóru, at tingarbeiðið var mett at verða eitt fulltíðarstarv, lønin varð flokkað í 34. lønarflokki í sáttmálanum hjá tænastumonnum landsins, eins og eftirløn eisini varð sett við støði í sama sáttmála.

Munurin á eftirlønini hjá einum tænastumanni og einum tingfólki er, at tænastumenn vinna sær fulla eftirløn eftir 37 árum á arbeiðsmarknaðinum, meðan áramálið fyri fulla eftirløn hjá tingfólki er 16 ár. Lógin ásetti eisini løn og eftirlønarviðurskifti hjá løgmanni og landstýrisfólkum.

Við gildiskomu eftir løgtingsvalið í 2015 varð samtykt ein nýggj skipan fyri landsstýrið, har høvuðsbroytingin er, at lønin hækkaði, og eftirlønin varð broytt til eina 15% eftirlønaruppsparing.

Tað er ein avbjóðing í verandi skipan, at munandi broytingar eru gjørdar í lønum og eftirlønum hjá landsstýrisfólkum, uttan at nakað er gjørt við viðurskiftini hjá løgtingsfólkum. Í løtuni er talan um tvær sera ymiskar skipanir, serliga tá um eftirløn ræður. Tað er óheppið, tí tað er ein sannroynd, at fólk javnan flyta seg úr Løgtinginum og øvugt.

Tað eru gjørdar nakrar royndir síðan 2015 at broyta skipanina hjá løgtingsfólkum, uttan at tað hevur eydnast at finna semju um hesar.

Á heysti 2023 vóru allir flokkar samdir um, at løgtingsforkvinnan skuldi heita á lønarnevndina um at gera eitt uppskot um hesi viðurskifti. Hin 16. februar 2024 handaði lønarnevndin løgtingsforkvinnuni álit um framtíðar lønar- og eftirlønarskipan fyri tingfólk.

Undirtøka var ikki frá øllum flokkum um at leggja samlaða tilmælið frá lønarnevndini fram. Tó tykist rímuliga breið semja at vera fyri at fara frá verandi skipan, har tingfólk fáa tænastumannaeftirløn við serligum treytum, til eina eftirlønarskipan, har ávísur % partur av lønini verður goldin í góðkenda eftirlønarskipan.

Tilmælið frá lønarnevndini er, at lønin verður umflokkað, soleiðis at hon flytir tveir lønarflokkar upp úr 34. til 36. lønarflokk, samstundis sum skattafría kostnaðarískoytið verður tikið av. Uppskotssetararnir hava mett tað verða rættast í verandi støðu ikki at mæla til nakra broyting í mánaðarlønini hjá tingfólki.

Grein 25 nevndin hevur viðgjørt framlagda lógaruppskotið og tilmælið frá lønarbólkinum. Nevndin er samd um ein stóran part av tilmælunum, men er ikki samd um tilmælið frá lønarnevndini um at hækka tingfólkalønirnar.

Semja er um:

- At fara frá verandi eftirlønarskipan til eina 15% skipan, við tilmæltu umrokning (%-stiga).
- At fara frá 4-6 mðr. bíðiløn til 3-6 mðr.
- At fara frá einari skipan við ongari mótrokning í fráfaringarsamsýningum, til at mótroknað verður í teimum førum, har tingfólk og varafólk hava aðra lønarinntøku í fráfaringar-tíðarskeiðnum.
- At broyta skipanina við bíðiløn til varafólk; bæði í sambandi við val, og tá hesi fara úr tinginum í úrtíð.
- At fara frá forútgoldnari løn til afturút goldnað; tó við skiftisreglu fyri tey, sum halda fram aftaná valið.
- At løgtingsformaður verður javnsettur við løgmann í øllum lutum.
- At ein felags lønarnevnd skal geva tilmæli um lønir til landsstýrisfólk og tingfólk.
- At eftirlønaraldurin í nýggju skipanini skal fylgja fólkapensjónsaldrinum.
- At koyripeningur verður latin eftir somu skipan sum í dag, tó so, at ásett verður, at hetta er fyri stytstu og bíligastu farleið.

Tað eru fleiri fyrimunir við at avtaka verandi eftirlønarskipan.

Tað er ongin ivi um, at tað er betur og haldførari fyri landskassan at fara frá einari skipan, har ein lutfalsliga dýr eftirløn ikki fellur til gjaldingar fyrr enn tann dag, tá ið tingfólk fara at fáa eftirløn, og til eina skipan, har eftirlønin er ein prosentpartur av lønini, sum verður goldin inn í eina góðkenda eftirlønarskipan so hvørt.

Sum er, veksur eftirlønarbyrðan hjá landinum ár fyri ár, og liggur og bíðar, til hon kemur til útgjaldingar eina ferð í framtíðini.

Tað eru ongar beinleiðis útrokningar av, hvat sparingin hjá landskassanum verður. Tó vísir álitið frá lønarnevndini munin í vøkstrinum á eftirlønarútreiðslunum hjá landstýrinum frá 2012 til 2016 samanborið við 2016 til 2019. Har sæst, at hækkingin í eftirlønarskylduni fyri landstýrisfólk er munandi lægri frá 2016, tá ið eftirlønarskipanin var broytt.

Ilt er at siga neyvt, hvussu nógv landið sparir við at leggja um til nýggju eftirlønarskipanina fyri tingfólk. Hetta veldst m.a. eisini um, hvussu skjótt hetta verður gjørt, men sambært tølum úr landsroknskapinum, sum eisini eru endurgivin í álitinum frá lønarbólkinum á bls. 6, sæst eftirlønarbyrðan fyri landið við árslok 2012, 2016 og 2019 av ávikavist ting- og landsstýrisfólkum.

Fyri landsstýrisfólkini, sum eru lutfalsliga fá í tali í mun til tingfólk, vaks byrðan eksplosivt úr 106 mió. kr. í 2012 til 161,5 mió. kr. í 2016, tá eftirlønarskipanin fyri landsstýrisfólk bleiv broytt. Vøksturin frá 2012 til 2016 áljóðandi uml. 55 mió kr. minkaði til uml. 15 mió kr. frá 2016 til 2019. Fyri tingfólk, har eingin broyting er gjørd í skipanini, heldur vøksturin fram á sama eksplosiva hátt úr 188 mió kr. í 2012, til 276 mió. kr. í 2016 og 363 mió. kr. í 2019. Ein yvirskipað meting , sum sæst í fylgiskjali 2 til uppskotið, er, at eftirlønarbyrðan fyri tingfólk kann vaksa upp til 500 mió. kr.

Nevndin metir tí, at tað er átrokandi neyðugt at fáa umlagt eftirlønarskipanina, so vøksturin í eftirlønarskyldum landskassans til tingfólk eisini kann tálmast, eins og gjørt er fyri landsstýrisfólk í 2015, tí annars fer útreiðslan til eftirløn at vaksa ógvusliga komandi árini.

Harafturat metir nevndin, at tað er rætt og rímuligt, at eftirlønin hjá tingfólkum líkist eftirlønarskipanini á arbeiðsmarknaðinum annars, og tí verður eisini skotið upp, at eftirlønaraldurin hjá tingfólki verður tann sami, sum tann til eina og hvørja tíð galdandi eftirlønaraldur í samfelagnum annars, tvs. fólkapensjónsaldurin.

Semja er eisini um at fara frá einari skipan við ongari mótrokning í fráfaringarsamsýningum, til at mótroknað verður í teimum førum, har tingfólk og varafólk hava aðra lønarinntøku í fráfaringartíðarskeiðnum. Hetta vil eisini merkja eina sparing fyri landið uppá sikt, og er hetta ein javnseting av hesum viðurskiftum við reglurnar á arbeiðsmarknaðinum annars.
Nevndin metir eisini, at tað hevur stóran týdning at geva varafólki betri sømdir enn í dag.

Fyrliggjandi uppskot tekur ikki støðu til spurningin um nevndarsamsýningar. Hesar eru óbroyttar síðan 1999, og er samsýningin tann sama uttan mun til arbeiðsbyrðuna hjá ymsu nevndunum. Nevndin mælir til, at ein komandi lønarnevnd tekur støðu til eina møguliga dagføring av hesi skipan.

Tá ið tað kemur til at áseta lønina frá 34. til 36. lønarflokk hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein samd nevnd heldur tað vera óheppið, at tingfólk, sum sita á tingi undan komandi vali, og sum halda fram aftaná valið, skulu vera rakt av umleggingini av lønarskipanini frá at vera forútlønt til afturútlønt, og harvið ikki at fáa útgoldið løn í tveir mánaðir. Bíðilønin verður stytt við einum mánaði, úr minimum 4 mánaðir til minimum 3 mánaðir. Tí heldur nevndin tað eisini vera rætt, at tey tingfólk, sum halda fram í tingsessinum aftaná valið, fáa útgoldið løn samsvarandi nýggju skipanini fyri tann mánaðin, tá nýggja tingið tekur við.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 9 verður sum stk. 3 sett:

"*Stk. 3.* Tingfólk, sum sótu á tingi undan løgtingsvalinum sbrt. stk. 1, og sum halda fram í tingsessinum aftaná valið, fáa útgoldið samsýning sambært § 1, stk. 1 fyri tann mánaðin, tá nývalda tingið tók við."

Viðmerkingar:
Við hesari ásetingini verður tryggjað, at tingfólk, sum halda fram í sessinum, ikki koma í ta óhepnu støðu, at tey ikki fáa samsýning mánaðarliga, tá umleggingin hendir, og harvið skulu tveir mánaðir eftir næstu lønini. Við hesari ásetingini fáa tingfólk samsýning sbrt. § 1, stk. 1 fyri allan hendan mánaðin, tá tingið tekur við, og síðan vanliga samsýning eftir § 1 seinast í mánaðinum, sum kemur aftaná, at tingið tók við.

Harumframt hevur nevndin undir viðgerðini býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Eyðgunn Samuelsen og Hervør Pálsdóttir) mælir til at halda fast við uppskotinum frá uppskotssetarunum og mæla harvið til onga broyting gera í mánaðarlønini hjá tingfólkum.

Tingarbeiði kann illa sammetast við onnur størv. Løgtingsfólk hava fingið álit frá fólkinum, og løgtingsfólk hava í so máta ongan annan arbeiðsgevara enn Føroya fólk, sum eisini ger av, um tingfólk eftir eitt valskeið framvegis hava teirra álit at halda á í starvinum.

Tingarbeiðið er sera samansett við fjølbroyttum uppgávum – bæði á løgtingi og uttanfyri tinggátt. Men tað er somuleiðis ein framíhjárættur at fáa møguleikan at ávirka og verða við til at flyta samfelagið ein ávísan veg. Tað gevur eisini stóra ábyrgd. Tí hevur tað sjálvsagt týdning, at lønin er nøktandi og sambærilig við starvið sum tingfólk.

Lønin hjá løgtingsfólki fylgir sáttmálanum hjá Tænastumannafelagnum og hækkar regluliga sambært sáttmálanum. Til seinastu samráðingar fingu løgtingsfólk eina trivaliga lønarhækkan.

Tað snýr seg um at finna røttu javnvágina, hvat ein rímilig løn er, samanborið við tær uppgávur, ábyrgd, framíhjárætt og fyrimunir, sum fylgja við starvinum sum løgtingsfólk.

Minnilutin metir, at verandi løn er nøktandi og rímilig, og mælir tí Løgtinginum til ikki at hækka lønina í verandi støðu, men at samtykkja uppskotið, sum er lagt fram.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskotinum hjá eini samdari nevnd tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Beinir Johannesen, Sólvit E. Nolsøe og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Løgtingsforkvinnan fekk fulla undirtøka fyri á heysti í 2023 at biðja um eitt dagført tilmæli frá eini nevnd um samsýningina hjá løgtingsfólki. Sama nevnd, sum gjørdi eitt tilmæli í 2018 eftir umbøn frá táverandi løgtingsformanni Páll á Reynatúgvu, bleiv biðin um eitt dagført tilmæli. Nevndin varð mannað av Mariu á Dul, Jógvani Amonsyni og Gunn Ellefsen.

Dagførda tilmælið var liðugt fyrr í ár og handað løgtingsforkvinnuni. Stórt sæð er tað sama tilmælið sum í 2018, men við dagføringum. Tað má ásannast, at tað er trupult at gera eitt tilmæli um samsýning til løgtingsfólk. Nevndin ásannar tað eisini í tilmælinum. Tað er torført at sammeta løgtingsarbeiðið við onnur størv, tí umstøðurnar eru ólíkar øðrum størvum.

Broytingarnar, sum verða tilmæltar, eru í stóran mun gjørdar fyri at javnseta samsýningina hjá løgtingsfólki við treytir, sum eru kendar frammanundan á arbeiðsmarknaðinum. Stóra broytingin er at fara frá ógvuliga úrtøkugóðu eftirlønarskipanini og til eina eftirlønarskipan, sum størsti partur av arbeiðsmarknaðinum longu hevur frammanundan.

Í § 25 nevndini, sum hevur arbeitt við uppskotinum, er eisini semja um flestu broytingarnar, sum eisini sæst í álitinum omanfyri.

Lønarnevndin sigur í tilmælinum, at mælt verður til, *at allar broytingar verða settar í verk í einum aftaná næsta val sum ein samlað loysn.*

Tað metir hesin minnilutin av § 25 nevndini eisini vera rætt at gera. Tí mæla vit Løgtinginum til eisini at samtykkja at flyta tingfólk úr lønarbólki 34 eftir tænastumannalógini og upp í lønarbólk 36, sum tilmælið sigur.

Lønarnevndin sigur millum annað í grundgevingunum fyri at flyta lønarbólk, at í mun til ábyrgdina í starvinum, eigur samsýningin hjá løgtingsfólki at vera á hædd við hana hjá alment settum starvsfólkum við rímiliga stórari fakligari ábyrgd og fulltrúum við rímiligari langari útbúgving og starvsaldri.

Tá talan er um eitt samlað tilmæli, sum nevndin hevur gjørt, er í veruleikanum talan um eina umlegging av samsýningini. Tí vil tað hava við sær, at um lønarflokkarnir ikki verða broyttir, men pensjónin og ískoyti tikið burtur, samstundis sum t.d. ferðaendurgjaldið verður broytt, er í veruleikanum talan um ein lønarniðurskurð hjá teimum løgtingsfólkum, sum verða vald næsta løgtingsval í mun til tey, sum sita nú. Tað meta vit ikki vera rímiligt.

Hesin minnilutin heldur tað vera rætt at strika skattafría ískoyti á 2000 kr. um mánaðin, eins og arbeiðsbólkurin mælti til, men heldur hinvegin ikki orsøk vera til, at Løgtingið í staðin skal útvega tingfólkum fartelefon og telefonhald, eins og arbeiðsbólkurin mælti til.

Hesin minnilutin setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1)** Í § 1, stk. 1 verður “34. lønarflokki” broytt til: “36. lønarflokki”.

**2)** Í § 1 verður stk. 4 orðað soleiðis:
“*Stk. 4.* Gjøldini sambært stk. 2-3 eru skattafrí.”

Við hesum broytingaruppskoti og broytingaruppskotinum hjá eini samdari nevnd mælir hesin minnilutin Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti (**Johan Dahl) er samdur við minnilutanum omanfyri um lønarspurningin, men heldur tað ikki vera rætt at strika kostnaðarfría endurgjaldið á 2000 kr. í § 1, stk. 4.

Hesin minnilutin setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1, stk. 1 verður "34. lønarflokki" broytt til: "36. lønarflokki".

Við hesum broytingaruppskoti og broytingaruppskotinum hjá eini samdari nevnd mælir hesin minnilutin Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**§ 25 nevndin, 13. mai 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðgunn Samuelsen<br>forkvinna | Johan Dahl<br>næstformaður | Beinir Johannesen |
| Hervør Pálsdóttir | Sólvit E. Nolsøe | Steffan Klein Poulsen |